


# Sir Elton John við tórshamaranum





Elton John spældi alla konsertina í gjárvkøldið við merkinum hjá Tórshavnar býi á bringuni. Heðin Mortensen, borgarstjóri, gav honum nálina við "vápnaskjøldrinum" við tórshamarinum beint undan konsertini, tá hann eisini handaði honum gávuna frá býráðnum, ið var ein myndabók og eitt listarverk úr glasi, sí niðanfyri. Elton var sera fegin um at vera vorðin "riddari av Tórshavn", sum skemtiliga varð tikið til. Annars var trygdin í hásæti og borgarstjórin var tann einasti umframt fyrireikararnar, sum slapp at tosa við Sir Elton, sum vanliga vil hava fullkomnan frið fyri bæði gestum og fjølmiðlum.

*(Mynd: Pauli Djurholm)*



## *Kim Hansen,*

*sum í gjárkvøldið hitti Elton John*

**Hvat tosaðu tú og Elton John um?**
- Tað var mest leyst prát. Hann spurdi, um eg búði her í Havn, og hvar eg plagdi at spæla. Hann var blíður.

**Hvussi dámdi tær konsertina?**
- Konsertin var frálík. Men eg fekk illa lurta, eftirsum nógv fólk vildu hava orð á meg, og so hevði eg lítlu dóttrina við eisini.

**Er tú nøgdur við tína egnu framførslu?**
- Nøkulunda miðal. Eg var í so hásur, helt eg.

**Nær fekk tú at vita at tú skuldi hita upp?**
- Kvøldið áðrenn.

## Í DAG




Lot til andøvsgul av norði, 3 til 8 m/s, mest turt við nakað av sól. Út á dagin snarar hann í ein eystan, framvegis turt og nakað av sól. Um náttina upp í gul til stívt andøvsgul, 5 til 10 m/s, turt og skýggjað. Hitin alt samdøgrið millum 8 og 12 stig.

## HÓSDAGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av eystri og landsynningi, 8 til 13 m/s, skýggjað og út á seinnapartin regn av útsynningi. Hitin millum 8 og 12 stig.

## FRÍGGJADAGIN




Andøvsgul upp í ein strúk av suðri og landsynningi, 8 til 13 m/s, fyrst skýggjað og regn, men út á dagin klárar hann í við sólglottum. Hitin millum 8 og 12 stig.

## LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst í ein landnyrðing úr Føroyum hvørvur í ein landnyrðing og grynnist. Í dag verður ein veikur hátrýstryggur yvir Føroyum, og komandi dagarnar reka brúgvaløg við regni inn yvir Føroyar av útsynningi.




## HITALAG




## AVFALL




Miðal: 61 mm

### Hitalagið kring knøttin

| | | | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Nuuk** | 5 | **Tromsø** | 6 | **Moskva** | 16 | **Athen** | 26 |
| **Reykjavík** | 11 | **Bergen** | 12 | **Berlin** | 25 | **Beijing** | 30 |
| **Tórshavn** | 10 | **Oslo** | 22 | **Paris** | 20 | **New Dehli** | 30 |
| **Lerwick** | 9 | **Stokkhólm** | 20 | **Madrid** | 28 | **Bangkok** | 34 |
| **Aberdeen** | 12 | **Keypmannah.** | 19 | **Róm** | 26 | **Sydney** | 14 |
| **London** | 19 | **Helsinki** | 16 | **Malorca** | 26 | **New York** | 33 |



**Petur Skeel Jacobsen** greiðir frá um veðrið

## VESTFALLSKYRRINDI

26. juni — Fullmáni
1. juli — Mánin longst frá jørðini
4. juli — Seinna kvarter

Kelda. Álmanakkin 2010

| Dagur | Suðuroyar-/ Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/ Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/ Sundalagnum fp. | sp. | Vestmanna-sundi fp. | sp. | Mykines-firði fp. | sp. | Nólsoyar-firði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/ Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvanna-sundi fp. | sp. | Fugloyar-firði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 30. juni | 10:24 | 22:43 | 09:24 | 21:43 | 09:39 | 21:58 | 00:04 | 12:24 | 01:04 | 13:24 | 08:39 | 20:58 | 07:39 | 19:58 | 10:39 | 22:58 | 11:39 | 23:58 | 10:09 | 22:28 | 11:24 | 23:43 |
| 1. juli | 11:03 | 23:21 | 10:03 | 22:21 | 10:18 | 22:36 | 00:43 | 13:03 | 01:43 | 14:03 | 09:18 | 21:36 | 08:18 | 20:36 | 11:18 | 23:36 | - | 12:18 | 10:48 | 23:06 | - | 12:03 |
| 2. juli | 11:39 | 23:57 | 10:39 | 22:57 | 10:54 | 23:12 | 01:21 | 13:39 | 02:21 | 14:39 | 09:54 | 22:12 | 08:54 | 21:12 | 11:54 | - | 00:36 | 12:54 | 11:24 | 23:42 | 00:21 | 12:39 |
| 3. juli | - | 12:15 | 11:15 | 23:46 | 11:30 | - | 01:57 | 14:15 | 02:57 | 15:15 | 10:30 | 23:01 | 09:30 | 22:01 | 00:12 | 12:30 | 01:12 | 13:30 | - | 12:00 | 00:57 | 13:15 |
| 4. juli | 00:46 | 13:18 | - | 12:18 | 00:01 | 12:33 | 02:46 | 15:18 | 03:46 | 16:18 | 11:33 | - | 10:33 | 23:05 | 01:01 | 13:33 | 02:01 | 14:33 | 00:31 | 13:03 | 01:46 | 14:18 |